**SOLEIÐIS**

# endurnýggjar tú Samleikan

## 2 ára gildistíð

Tín Samleiki er galdandi í tvey ár. Tú mást endurnýggja Samleikan, áðrenn gildistíðin er farin.
Um tú ikki endurnýggjar Samleikan, verður hann óvirkin, og tú kanst ikki brúka Samleikan uttan at bíleggja av nýggjum.

## Áminning á Vanganum

Øll, sum brúka Vangan fáa eina áminning um at endurnýggja Samleikan. Áminningin verður send 30 dagar áðrenn gildistíðin er farin. Fráboðan verður víst í Vanga appini og í telduposti, tá nýggjar hendingar eru í kalendaranum.



## Nær gongur tín Samleiki út?

Far undir stillingar í Samleika appini. Vel 'um Samleikan' í valmyndini. Her sært tú gildistíðina á tínum Samleika.

## Endurnýggja Samleikan í appini

*- tað er skjótt og einfalt at gera*

1. **Lat upp Samleika appina**
   Hetta skal vera á telefon ella teldli, sum tú hevur tín Samleika á.

2. **Far undir Stillingar**
   Vel at endurnýggja Samleikan og les vegleiðingina, sum kemur fram á skerminum.

3. **Skriva loynitalið**
   Tú skrivar núverandi loynital fyri at endurnýggja Samleikan. Síðani verður tú biðin um at velja nýtt loynital.

4. **Samleikin er endurnýggjaður**
   Nýggja loynitalið kann vera tað sama sum tað gamla. Vit mæla til at broyta loynitalið við jøvnum millumbili.




## Endurnýggja Samleikan á geyma

Um tú hevur Samleikan á geyma, skalt tú ringja til Talgildu Føroyar á telefon1881, um at endurnýggja.
Brúkaratænastan hevur opið yrkadagar frá kl 8 til 16.

Minst til at hava geyman og samleikaprógv (pass ella koyrikort) við tær, tá ið tú skalt endurnýggja.

les meira á www.samleikin.fo/endurnyggja

TALGILDU
FØROYAR
01100110 01101111